Høgni Hoydal:

# Vit hava fleiri møguleikar

**– Sjálvstýristilgongdin er ikki fallin, sigur Høgni Hoydal, nú flokkarnir eru farnir undir at skipa samgongu**

SAMRÁÐINGAR
*Heri á Rógvi*

Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, er bjartskygdur undan innleiðandi samgongusamráðingunum.

– Sjálvstýristilgongdin er ikki fallin, staðfestir Høgni Hoydal.

Hann heldur, at teir hava fleiri samgongumøguleikar. Teir hava higartil havt fundir innanhýsis í samgonguni. Høgni Hoydal heldur eisini, at samgongan hevur góðar møguleikar møguleikar at halda fram.

Høgni Hoydal tulkar valúrslitið soleiðis, at tað stendur messum á jøvnum. Hann heldur ikki, at samgongan eigur at leggja frá sær, tí hendan ongan meiriluta hevur ímóti sær.

– Mín tulking er, at samgongan fall ikki, sigur Høgni Hoydal.

Tjóðveldisflokkurin hevði í gjár fundir í tingbólkinum, har teir m.a. ætla at skipa seg.



*Høgni Hoydal heldur eisini, at samgongan hevur góðar møguleikar møguleikar at halda fram.*

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg

# Fara til samráðingar í dag

**Anfinn Kallsberg hevur kallað andstøðuflokkarnar saman til eitt prát seinnapartin í dag**

SAMRÁÐINGAR
*Heri á Rógvi*

Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur kallað andstøðuflokkarnar saman til fundar í dag. Talan verður um fundir, sum mestur fara at vera óformellir, har løgmaður leggur upp til eitt orðaskifti við flokkarnar.

Løgmaður hevur longur tosað við sínar samgongur felagar, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin. Løgmaður hevur sambært stýrisskipanina rætt til at halda fram, um hann ikki fær ein meiriluta ímóti sær.

Við Útvarp Føroya sigur Anfinn Kallsberg, at at ein møguleiki er, at hava eina samgongu, sum ikki hevur meirilutan ímóti sær. Men ein smøl samgonga er viðbrekin, viðgongur hann.

Tískil er helst neyðugt at finna ein breiðan politiskan grundvøll.

Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, hevur áður úttalað seg um, at Fólkaflokkurin er tann flokkurin, sum situr í einari lyklastøðu undan samgongusamráðingunum.

*Løgmaður er nú farin undir at kunna seg um, hvørjar møguleikar hann hevur at skipa samgongu.*



Jóannes Eidesgaard:

# Samgongan má hálsa um

**– Føroya fólk hevur sagt nei til sitandi samgongu og verandi samgongupolitikk, og teir mugu leggja sjálvstýrispolitikkin um, sigur Jóannes Eidesgaard**

SAMRÁÐINGAR
*Heri á Rógvi*

Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum, hevur eisini saman við sínum floksmonnum fingið fundarboð frá løgmanni.

Jóannes Eidesgaard hevur heldur ikki útilokað nakran møguleika, áðrenn hann fer á fundin. Áður hevur nógv verið tosað um eina samgongu millum Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin, men hendan er ikki møgulig uttan so, at aðrir stuðlar vera við.

Formaður Javnaðarflokksins tulkar valúrslitið soleiðis, at fólkið hevur sagt nei til samgonguna, hóast hon ikki hevur fingið ein meiriluta ímóti sær.

– Føroya fólk hevur sagt nei til sitandi samgongu og verandi samgongupolitikk, og teir mugu leggja sjálvstýrispolitikkin um, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaðurin leggur dent, at politiska innihaldið í einari komandi samgongu ikki má vera fullveldi.

– Vit virða, at løgmaður situr við ein møguleika sum hesum, og hetta haldi vit sjálvandi, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann ásannar eisini, at tað hevði komið óvart á mong, um Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin høvdu funnið saman, eftir ljóðinum í valstríðnum at døma.

Jóannes Eidesgaard sigur seg hava upplivað tað áður, at flokkar leggja á aðra leið, eftir valúrslitið er greitt.

– Vit mugu fyrst og fremst virða fólkið. Fólkið hevur sagt, at ferðin má setast niður í sjálvstýristilgongdini. Tað er greið tala, sigur Jóannes Eidesgaard.

Nýggi tingbólkurin hjá Javnaðarflokkinum skal eisini hittast fyri fyrstu ferð, har menn fáa ein kjans at hitta hvønn annan og práta saman. Nýggi maðurin í tingbólkinum er Gerhard Lognberg í Skopun.

Um sítt persónliga val sigur Jóannes Eidesgaard, at hann er glaður og takksamur fyri tann nógva stuðulin. Hann misti tó persónliga nógvar atkvøður. Hann heldur, at hetta skyldast serliga, at tvøroyrarfólk vildu hava tveir menn inn á Tvøroyri. Vanliga er ein maður haðani valdur, og hesaferð var tað um reppið, at veteranurin Sverri Midjord varð valdur inn á ting. Allir hinir tríggir tingmenninir vórður valdir í syðra endanum av Suðuroynni.



*–Vit mugu fyrst og fremst virða fólkið. Fólkið hevur sagt, at ferðin má setast niður í sjálvsstýristilgongdini. Tað er greið tala, sigur Jóannes Eidesgaard.*



Jenis av Rana:

# – Glaður fyri møguleikan

**– Tað kann hava ómetaliga stóran týdning fyri Miðflokkin at koma í samgongu, sigur Jenis av Rana**

SAMRÁÐINGAR
*Heri á Rógvi*

Jenis av Rana og Miðflokkurin kunnu koma í ein rættan lyklaleiklut, nú politisku flokkarnir eru farnir at hyggja seg um eftir samstarvsfeløgum til eina komandi samgongu.

Sjálvur er Jenis av Rana fegin um valúrslitið týsdagin.

– Fyri Miðflokkin og fyri meg var tað eitt gott val. Vit fingu eina lítla framgongd. Vit høvdu vónað, at fingið ein mann afturat, men eg haldi, at talan var um eitt gott val, sigur Jenis av Rana.

Jenis av Rana heldur ikki, at valúrslitið skal tulkast soleiðis, at samgongan fall.

– Valúrslitið segði, at tað skal ganga eitt sindur spakuligari á sjálvstýrisleið. Tað ger einki, um ferðin verður sett niður á tilgongdini. Eg haldi tó, at núverandi sjálvstýristilgongd heldur og kann halda fram, men ferðin nýtist ikki at vera tann sama, sigur Jenis av Rana.

Formaður Miðfloksins heldur, at Miðflokkurin hevði væl riggað saman við núverandi samgongu, og hann er sannførdur um, at teir høvdu styrkt samgonguna á fleiri økjum. Serliga innanfyri trivnaðarmál hevði Miðflokkurin kunnað gagna samgonguni, sigur Jenis.

Jenis av Rana vil tó ikki velja nakran partin framum. Hann heldur, at teirra sjónarmið innanfyri tað ríkisrættarligu støðuna passa væl saman við samgonguni, tí hann heldur, at vit mugu taka ræðið á egnum landi. Men hjá Miðflokkinum verður hesin spurningurin ikki raðfestur ovast, og hann heldur, at Javnaðar- og Sambandsflokkurin høvdu kunnað komið eins langt á sjálvstýrisleið sum samgongan hesi seinastu fýra árini, tí samgongan er ikki komin langan veg.

– Høgni Hoydal kann taka hetta sum eina áminning, at ferðin er ov høg á sjálvstýrisleið, sigur Jenis av Rana.

## Einsamallur

Sum einsamallur tingmaður fyri Miðflokkin veit Jenis av Rana at siga, at hetta er ómetaliga strævið arbeiði, og hann hevði tí verið ógvuliga fegin um, at flokkurin hevði kunnað komið í samgongu og fingið ein landsstýrismann, nú tað heldur ikki eydnaðist at fáa ein tingmann afturat.

Teir hava áður vilja havt ein landsstýrismann í familjumálum, men hetta er ikki nakað ófrávíkiligt krav, og teir kundu eitt nú eisin hugsað sær, at almanna og heilsu mál vórðu skild at.

Jenis av Rana fer á fund við løgmann við einum opnum sinni, sigur hann.



*Jenis av Rana fegnast um, at teir hava góðan møguleika at koma í eina samgongu.*

Lisbeth L. Petersen:

# Hevur góðar vónir

**Lisbeth L. Petersen hevur góðar vónir um at sleppa í samgongu.**

SAMRÁÐINGAR
*Heri á Rógvi*

– Vit fara at tosa við løgmann og vita, hvat hann hevur at siga, sigur Lisbeth L. Petersen.

Lisbeth L. Petersen og Sambandsflokkurin eru eisini kallaði inn til fund við løgmann, og forkvinna í Sambandsflokkuri, sum gjørdist stóri sigursharrin á valinum týsdagin, sigur, at hon hevur góðar vónir.

– Valskráin hjá okkum er framvegis óbroytt, sigur Lisbeth L. Petersen.

– Eg haldi, at fólkið talaði greitt á valinum, sigur Lisbeth.

Hon sigur, at Anfinn Kallsberg, løgmaður, nú eigur initiativið, og hetta virðar hon.

– Tað er so upp til hann at gera, sum hann vil, men eg haldi, at fólkið talaði greitt, hvønn tey ynskja at vera við í samgonguni, sigur Lisbeth.

Hon ásannar, at tað er Javnaðarflokkurin, sum liggur nær at Sambandsflokkinum, og tað hinvegin er Tjóðveldisflokkurin, sum liggur longst vekk. Hon avvísir einki og vísir á, at Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava samstarvað væl áður.

Sambandsflokkurin hevur eisini havt fund innanhýsis í tingbólkinum, sum jú inniheldur fleiri nýggj nøvn.



*Lisbeth L. Petersen hevur góðar vónir undan innleiðandi samráðingunum.*

# Aftur í 80'ini á Kambsdali

**Leygarkvøldið tann 4. mai verður farið aftur í 80'ini í høllini á Kambsdali, har bæði tónleikabólkar og plátuvendari fara at standa fyri ferðini aftur í áttatiárini, tá alt gekk við rúkandi ferð**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Leygarkvøldið tann 4. mai verður farið aftur í 80'ini í høllini á Kambsdali. Orkestrini Science Fiction, Musketerarnir og Deiggj fara á pallin. Millum bólkarnar leggur kendi DJ'arin Atli Larsen fløgur á.

Tað eru Fuglafjarðar Hornorkestur og Fuglafjarðar Billardfelag, sum skipa fyri tiltakinum.

## Ferð á

Áttatiárini vóru árini, tá alt gekk við rúkandi ferð, og fyrireikararnir siga, at ætlanin er eisini at fáa ferð á dansin.

Bussar koyra úr Havn og aftur av Kambsdali til Havnar og til Leirvíkar klokkan 04:30. Tey, ið ynskja pláss í bussunum, kunnu ringja 216464.

Verður verkfallið av, so verður eisini skipað so fyri, at samband verður til Klaksvíkar.

Óivað ein glað dansinátt hjá teimum, sum vóru í bestu árum, tá alt gekk við ferð, og sum í dag ikki vita hvar tíðin so skjótt bleiv av. Men nú verður høvi at minnast aftur á og fáa ein swingom til besta 80'ara tónleikin.